# Við eitthvørt høvi

**Olaf Sólsker á Eiði tímdi ikki longur at vera langfarafiskiskap, og hann keypti sær tí ein 35 fót stórum bát at rógva út við**

BÁTA PRÁT
*Heri á Rógvi*

Við bátabrúnna á Eiði finna vit Olaf Sólsker. Hann hevur hendan dagin verið í Runavík fyri at keypa sær agn. Og agn hevur hann so sanniliga brúk fyri, tí báturin hjá honum fiskar væl.

Olaf Sólsker hevur at kalla alt sítt lív verið á sjónum. Hann fór fyri fyrstu ferð til skips sum fjúrtan ára gamal í 1967, og hann hevur siglt líka síðan.

Hann tók skipsførara-prógv í sjeytiárunum, og hann hevur ført skip í Grønlandi, Norra og Føroyum. Nú vildi hann vera nærri at familjuni og royna okkurt nýtt.

Saman við einum øðrum eiðismanni fer Olaf út á fjørðin við hvørt hóskandi høvi.

Og størsta orsøkin til nógvu túrarnar út í fjørðin er ein AWI Star 35.

5. februar í ár fekk Olaf handaðan nýggjan bátin hjá sær, og hann hevur síðani 11. februar nýtt bátin til fiskiskap.

Ikki kann sigast annað enn at báturin higartil hevur roynst sera væl.

– Vit hava fingið næstan 49 tons higartil í ár. Vit hava fleiri snellur umborð, men hava higartil hildið okkum til línu, sigur Olaf Sólker.

Ein tílíkur kostar nógv, og tað er vónleyst at forrenta ein tílíkan bát, uttan so at fiskað verður burturav. Kostnaðurin fyri ein tílíkan bát er ikki so langt undir tvær milliónir.

Báturin hjá Olaf er ein fýra bátum í hesari støddini, ið menn nýta til at rógva út við á Eiði. Hjá øllum hevur fiskiskapurin verður góður í ár.

– Eg trúgvi upp á, at tað ber til við hesum bátinum, sigur Olaf.

Báturin hevur klárað at siglt 17,4 míl, men vanliga arbeiðsferðin liggur um 10-12 míl.

Seinni í ár ætlar Olaf sær at fara at royna á Føroya Banka. Báturine rúmligur, og tveir mans fáa væl sovið umborð, sigur Olaf.



Ein AWI STAR 35 er 35 føtur langur. Volvo moturin hevur 360 hesakreftir.
*Mynd: Heri á Rógvi*



*Olaf: Olaf Sólsker trívist á sjónum, og hann trívist við sínum AWI 35, sum hann bara hevur rós at geva.*
*Mynd: Heri á Rógvi*

## Luttur – luktur

AWI Star 35 útgávan hjá Olaf er ikki tann nýggjasti í flotan, men hann er kanska tann við tí mest originala navninum. Báturin verður kallaður Luttur. Hetta er eitt ljóðføri, men merkir eisini luktur, og tað er hendan týdningin, sipað verður til við navninum.

– Langabbarnir hjá mær róðu út. Tað gekk væl hjá teimum við at fiska, og menn fóru at kalla bátin hjá teimum fyri Luttur, tí teir hildu, at orsøkin til góða fiskiskapin mátti vera, at báturin luktaði, sigur Olaf Sólsker.

Og eftir fiskiskapinum at døma, so er lukturin á hesum bátinum heldur ikki tann ringasta í so máta.

## Góður bátur

Samanlagt er Olaf ikki í iva, at báturin hjá AWI er ein góður bátur.

– Báturin hevur roynst ómetaliga væl. Hetta er vælaverk í allar mátar, sigur Olaf, sum ikki dylir fyri, at hann er glaður fyri bátin.

– Og so hevur tað eisini okkurt at siga, at hann er føroyskur, sigur Olaf.

Tað verður sostatt umborð á tí grøna Lutti, at eiðisfólk í framtíðini fara at finna Olaf Sólsker.






